Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur
Sunset deild

dagur	kl.	dystur	dómarar
21.11	14.30	StÍF-Søljan	Kristian Johansen & Dánjal Hansen
21.11	15.00	VB-VÍF	Hartvig Joensen & Pole Hansen
21.11	19.00	Stjørnan-Kyndil	Kári Hansen & Dánjal Hansen

Atlantic Airways kappingin

21.11	16.00	StÍF-Kyndil	Kristian Johansen & Dánjal Hansen
21.11	16.00	KÍF-VÍF	Kristian Joensen & Karstin Joensen
21.11	16.00	Neistin-H71	Hannus Wardum & Uni Wardum

Flogbóltur
Meistaradeild kvinnur

20.11	14.00	KÍF-SÍ	TB
20.11	14.00	Dráttur-Mjølnir	TB
21.11	15.00	TB-ÍF	Mjølnir

Meistaradeild menn

20.11	16.00	Fram-SÍ
20.11	16.00	Fleyr-Mjølnir

Hondbóltsstøður

SUNSET KAPPINGIN

KVINNUR

	dystir	v - j - t	v. mál	t. mál	mál-m.	stig
1 VB	6	5 - 0 - 1	183	128	55	10
2 Stjørnan	5	5 - 0 - 0	138	104	34	10
3 Neistin	6	4 - 0 - 2	177	132	45	8
4 Søljan	5	3 - 0 - 2	150	116	34	6
5 VÍF	6	3 - 0 - 3	148	144	4	6
6 StÍF	6	1 - 1 - 4	128	158	-30	3
7 Kyndil	5	0 - 1 - 4	92	146	-54	1
8 Tjaldur	5	0 - 0 - 5	98	186	-88	0

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

MENN

	dystir	v - j - t	v. mál	t. mál	mál-m.	stig
1 VÍF	6	5 - 0 - 1	168	152	16	10
2 H71	6	4 - 0 - 2	188	172	16	8
3 Kyndil	5	3 - 0 - 2	147	123	24	6
4 KÍF	6	3 - 0 - 3	159	172	-13	6
5 Neistin	5	1 - 0 - 4	145	150	-5	2
6 StÍF	6	1 - 0 - 5	160	198	-38	2

Flogbóltsstøður
Meistaradeild, kvinnur

	d	v - t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	5	5 - 0	15	3	12	10
2 TB	5	4 - 1	12	6	6	8
3 KÍF	5	3 - 2	9	8	1	6
4 Dráttur	5	2 - 3	12	10	2	4
5 ÍF	5	1 - 4	5	12	-7	2
6 SÍ	5	0 - 5	1	15	-14	0

Meistaradeild, menn

	d	v - t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	4	4 - 0	12	3	9	8
2 SÍ	4	3 - 1	10	5	5	6
3 Fleyr	4	2 - 2	8	6	2	4
4 Fram	4	1 - 3	5	10	-5	2
5 ÍF	4	0 - 4	1	12	-11	0

ÍF hevur málverja

Í grein í hósdagsblaðnum, har vit staðfestu, at Bartal Eliasen eisini verður í ÍF komandi kappingarár, kom tíverri ein heldur óheppin villa fyri. Staðfest varð, at tað nú bert vóru tvey ivamál í hópinum, og at annað av hesum var, hvør skal verja málið hjá ÍF.

Hetta er ikki rætt. ÍF hevur fyri stuttum boðað frá, at teir hava gjørt avtalu við Allan Joensen, um at hann komandi kappingarárið skal verja málið hjá besta mansliðnum.

Vit bijða Allan, ÍF og lesararnar annars um at halda okkum til góðar.

-jm

Sonni skal hjálpa Peturi

ÍF setti fyri nakað síðani Petur Simonsen í starv sum venjara hjá felagnum. Nú er so eisini greitt, hvør næsti maður hansara verður.

Tað verður Sonni Jensen, sum eisini er fuglfirðingur, sum verður hjálparvenjari.

Sonni og Petur hava áður samstarvað á venjarabeinkinum. Eitt nú í B36, har teir høvdu góð úrslit fyrst í 90'unum.

-jm

Albert til HB

Jóhannis Joensen verður ikki einasti vágamaðurin í HB komandi kappingarár.

Felagið hevur nevnliga á heimasíðuni boðað frá, at hjálparvenjari teirra til komandi kappingarár verður Albert Elelfsen.

Albert hevur áður røkt hesa uppgávuna í HB. Eitt nú var hann hjálparvenjari, tá HB í 1998 vann greipuna. Og eisini hevur hann verið venjari hjá besta liðnum hjá FS Vágum.

-jm

Mál á netinum

EB/Streymur hevur sum nakað nýtt gjørt tað møguligt hjá fjepparum at sígga nøkur av málunum, sum besta mansliðið hjá felagnum fekk í fjør.

Á slóðini http://mal.fo/, ber til hjá fjepparum at leita seg fram á gyltar løtur í árinum, sum er tað higartil besta hjá felagnum. So um veturin gerst nakað tungur og drúgvur hjá einum EB/Streyma-fan, so er bara at kaga við á alnetinum, har eitt nú perlurnar hjá Hans Paula Samuelsen og Sorin Anghel móti ávíkavist KÍ og NSÍ eru millum málini, sum til ber at hyggja at.

-jm

ÍSB nýggja avtalu

Ítróttarsambandið fyri Brekað hevur gjørt stuðulsavtalu við Føroya Banka fyri næstu tvey árini. Virksemi hjá ÍSB er nógv vaksið seinnu árini, og til tað krevst sjálvsagt nógvur peningur.

Við stuðlinum frá Føroya Banka metir ÍSB seg eisini at hava fingið viðurkenning fyri tað arbeiði, ið verður gjørt teimum brekaðu at frama.

-tn

Rimmar ítróttardagur

Einki er at ivast í, at pengarnir fara at koma væl við hjá ÍSB. Felagsskapurin skipar gjøgnum árið fyri hópin av tiltøkum, og um vikuskiftið verður eitt av teimum størru tiltøkunum.

Talan verður um ein ítróttardag, har iðkarar fara at kappast í svímjing og boccia.

Svimjingin fer fram í Eysturskúlanum, og har verður byrjað kl. 15. Boccia kappingin verður í Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn. Har verður byrjað kl. 9.30, og roknað verður við, at kappingin er liðug á leið 14.30

-jm

Annað umfar av TF vetrarkappingini í Klaksvík

VETRARKAPPING
tíðindaskriv

Leygardagin 20. november kl. 13.00 skipa Treysti og Tryggingarfelagið Føroyar fyri 2. umfari av TF Vetrarkapingini í Klaksvík.

TF Vetrarkappingin er nýggj kapping, sum Frælsur Ítróttur Føroya stendur fyri og Tryggingarfelagið Føroyar stuðlar. Talan er um eina vetrarkapping í seks umførum. Fyrsta umfar var fyri trimum vikum síðani á Toftum, meðan 3. umfar verður í Havn tann 11. des. Trý tey seinastu umførini verða í januar, februar og mars næsta ár.

Kappingin minnir um Grand Prix kappingina, sum er um summarið, tó er stigatalvan eitt sindur øðrvísi, og verður kappast í fýra aldursbólkum hjá monnum og kvinnum. Í Klaksvík leygardagin renna tey hesar teinar:

Veteranar kvinnur og menn (f. -1958)–7,850 km
Vaksin kvinnur og menn opin bólkur (f. -88)–7,850 km
Kvinnuunglingar og mansunglingar (f. 1984-88) – 7,850 km
Gentur og dreingir (f. 1989-93) – 3,140 km

Startur og mál verður í Kirkjubrekkuni uttan fyri Tryggingarfelagið Føroyar, og byrja øll samstundis. Rutan gongur niðan eftir Uppsalagøtu, Fosságøtu, norður eftir Vágsheygagøtu og oman gjøgnum Kirkjubrekkuna. Tey vaksnu renna tíggju umfør, meðan gentur og dreingir renna fýra umfør. Tryggingarfelagið Føroyar letur heiðursmerki og t-skjúrtu til nummar eitt, tvey og trý í øllum bólkum.

Tilmelding fer fram á www.athletics.fo innan fríggjakvøldið 19. november kl. 21.00.

Startnummur verða avheintað við Tryggingarfelagið Føroyar leygardagin kl. 12.15. Tá verður luttøkugjaldið, ið er kr. 50,- fyri tríggjar teir elstu aldursbólkarnar og kr. 20,- fyri yngsta aldursbólkin, eisini goldið.

Meira kunning um kappingina og kappingarreglurnar eru at finna á www.athletics.fo.

Máltindarnir

Kvinnur		
Ioana Rápa	VÍF	71 (22)
Daiva Tuomaite	VB	56 (24)
Nicoleta Radu Hansen	Søljan	55 (8)
Simona Petersen	Neistin	52 (13)
Aukse Vysniaskaite	VB	39 (1)
Vesna Tomajek	Tjaldur	38 (18)
Lotte Sørensen	Kyndil	35 (10)
Marjun Tróndarson	Neistin	33 (2)
Alina Olaru	Stjørnan	33 (4)
Ása Dam á Neystabø	Neistin	29 (2)
Lina Andriulyte	Søljan	29 (2)
Rebekka Justinussen	StÍF	28 (5)
Sunfrið B. Jacobsen	StÍF	28 (13)
Poula D. Olsen	StÍF	26
Rannvá Augustinussen	VB	26
Menn		
Henrik Gerster	H71	46 (4)
Ingi Olsen	VÍF	43 (13)
Agnar Joensen	VÍF	39 (2)
Áki Mørk	Neistin	37 (7)
Halgir D. Olesen	H71	35 (2)
Piti Negru	H71	33
Damir Oros	Neistin	31 (6)
Sveinur Justinussen	StÍF	30 (4)
Leivur Justinussen	StÍF	27 (4)
Høgni Klein	Kyndil	23
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	22 (2)
Josef Abrahamsen	Kyndil	22 (5)
Blagoje Buha	Neistin	21 (1)
Regin Petersen	KÍF	21 (2)
Jacob Jónsson	Kyndil	20



-tað loysir seg!

HÚS TIL SØLU

Sethús Per Mohrsvegur 7, Hoyvík
Húsini standa væl fyri og eru í góðum standi. Møguleiki er til útleigan av kjallara. Umhvørvið er frítt við sera góðum útsýni.
Støddin á húsunum er 123 m² x 2 + loft. Alt er innrættað.
Grundøkið er 525 m². Byggiár: 1982
Kostnaður: Kr. 1.600.000,- ella hægsta boð yvir

Sethús Blankagota 9, 100 Tórshavn
Vælhildin sethús sum standa út til fríøki við góðum útsýni.
Møguleiki er fyri at gera kjallaran til sjálvstøðuga íbúð.
Støddin á húsunum er 2 x 120 m². Alt er innrættað.
Grundøkið er 510 m². Byggiár: 1984
Kostnaður: Kr. 1.600.000,- ella hægsta boð yvir

Tvíhús Heygsgerði, Tórshavn
Húsini eru í trimum hæddum og standa væl fyri í ovaru vegsíðu av Heygsgerði. Ætlanin er at húsini standa liðug í januar 2005.
Støddin á húsunum er 67,9 m² í tveimum hæddum + loft.
Grundøkið er uml. 300 m².
Kostnaður: Kr. 1.500.000,-

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling.
Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.

HÚSAMEKLING
Sp/f Protek · Vagliø · Box 331 · 110 Tórshavn
Tel 319321 · Fax 319331 · protek@post.olivant.fo · www.husamekling.fo

Sosialurin 41490

til sølu

Sethús í Hoyvík

Húsini eru í 3 hæddum, tilsamans til víddar uml. 260², harav búøki er uml. 170². Húsini eru sermerkt og hava flagtak.
Miðhæddin hevur køk, grovkøk, alrúm, 2 stovur, wc, gongd, umframt hjall og terassu. Loftið hevur 3 kømur, sjónvarpsstovu, klædnarúm, baðirúm við gosbað. Kjallarahæddin er óinnrættað. Trappur eru ímillum hæddirnar.
Garður er um ognina. Grundøkið er 742² til støddar. Ognin liggur í Niðaragøtu 3, Hoyvík í barnavinarligum umhvørvi. Byggiár er 1993.

til sølu

Hús í Tórshavn

Sethúsaognin Dalavegur 22, 100 Tórshavn verður hervið lýst til sølu.

Húsini eru í 3 hæddum við lofti, miðhædd og kjallara. Samlað búvídd er 147 m². Á loftinum eru 4 kømur, gongd, umframt baðirúm. Í miðhæddini er køkur, 2 stovur, 1 kamar, baðirúm og gongd. Kjallarin er partvís innrættaður. Umframt kjallararúm eru í kjallaranum køkur, gongd, wc, og tvey rúm.
Grundøkið er 550 m². Garður er rundan um ognina.
Húsini eru bygd í 1959.
Húsini standa væl fyri miðskeiðis í býnum, við góðum útsýni.

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tel 311260 · Fax 311261
advokatfelagid@kallnet.fo

í Sosialinum
verða húsini seld

SETHÚSAMARKNAÐURIN

Almanna- og heilsumálaráðið

Keyp av húsi til sinnisveik

Almanna- og Heilsumálaráðið leitar eftir hóskandi húsi í ávikavist Norðurstreymoy ella Vágum, ið skulu kunna hýsa 4-5 sinnisveikum. Húsið skal kunna yvirtakast í 2004.

Fylgjandi treytir verða settar til húsið:
- Húsið skal vera bygt eftir 1990
- Húsið skal vera í góðum standi og í minsta lagi 240 fermetrar - møguliga í 2 hæddum
- Í húsinum skulu vera í minsta lagi 6 rúmlig kømur

Tað er Deildin fyri sinnisveik, ið framyvir skal reka húsið, og ætlanin er at hava felags virksemi við sambýli í Sandavági.

Ynskja tygum fleiri upplýsingar viðvíkjandi sølu av húsi til Almanna- og Heilsumálaráðið, eru tygum vælkomin av venda tygum til Jan Simonsen, fulltrúa, tlf. 304050 eller Regin Johansen, leiðara fyri Deildina fyri sinnisveik, tlf. 354020.

Almanna- og Heilsumálaráðið

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við